# Framleiða nógvar vørur sjálvir



Sum »stórbýur« hevur Reykjavík sjálvandi ein stóran handilsmiðdepil, sum eitur Kringlan, har alskyns handlar finnast. Ein bundin, ullint troyggja er framvegis ein av teimum best umtóktu souvenirunum hjá ferðafólki at keypa heim við sær aftur. Dygdin er góð, og prísurin er lægri enn nógva aðrastaðni. Eisini aðrar ullvørur er verdar at keypa. Til dømis teppi, vøttir, turruklæði og húgvur. Seinnu árini eru nógvir nýggir handlar komnir í Íslandi, har nýtmótans listhandverk verður evnað til úr íslendskum materali. Íslendska sniðgevingin er frammarlaga, so tí ber til at keypa nýmótans íslendsk klæði. Flestu útlendsku merkivørur eru at fáa í Reykjavík, har prísurin er tann sammi ella eitt lítið sindur lægri enn í øðrum størri býum. Hetta finst oftani í teimum smærri handlunum mitt í býnum.

























